# Morgunlesturin í útvarpinum

UNI NÆS

Fm. í KLH, Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag



Miðlaleiðarin í Kringvarpinum, Allan Dalsgarð, greiddi frá broytingum í skránni hjá Kringvarpinum í morgunsendingini í morgun. Broytingin verður galdandi frá mánadegnum 26. januar.

Hesi seinastu árini hevur morgunlesturin verið endursendur kl.09.50. Fyrr var morgunlesturin endursendur kl.10.05. Tá ið tann broytingin varð gjørd, varð sagt, at hetta var betur fyri heildina í morgunskránni frá kl.07.30-10.00.

Í morgun tosaði miðlaleiðarin um at hava eina heild í morgunskránni, og tí skal endursendingin av morgunlestrinum burtur! Saman við fimleikinum, sum verður endursendur eftir tíðindini kl.10.00!

Tað er uttan iva gott at hava eina heild í sendingunum. Hesi seinastu árini hevur morgunlesturin verið ein partur av hesi heild í morgunútvarpinum. Hetta hevur hóskað sera væl at enda morgunsendingina við morgunlestrinum.

At strika endursendingina av morgunlestrinum og at strika fimleikin er ikki tekin um góða planlegging. Tað eru mong, sum eru glað fyri, at morgunlesturin verður endursendur júst hasa tíðina kl. 09.50 – serliga hjá eldri fólki, sum er ein stórur lurtaraskari hjá kringvarpinum. Hetta tíðarskleiðið á degnum er ein tíð, har nógv av okkara eldru – serliga tey, sum búgva á ymiskum heimum og ansingarstovnum - eru komin fyri seg á degnum. Og kærkomið er tað eisini við fimleikinum eftir kl. 10.00. Tað kann ikki vera meiningin, at heildarfatanin hjá kringvarpinum, tá ið skráin skal leggjast, skal enda við at strika sendingar og gera tænastuna verri hjá lurtaranum.

Tað er gott at Kringvarpið hevur útbygt netvarpið – men tað er ikki tey eldri, sum brúka hesa tænastuna so nógv enn. Tey eru vaksin upp saman við útvarpinum, og lat okkum tí hava hesar endursendingarnar framvegis.

Vit hava nakrar kristiligar sendingar í kringvarpinum, sum fólk eru glað fyri og sum hava verið í kringvarpinum (útvarpinum) í meiri enn 50 ár. Lat hesar sendingarnar fáa frið. Hesar sendingarnar eru bert ein brotpartur av samlaðu senditíðini hjá kringvarpinum, og alt hetta tilfarið verið gjørt uttanfyri kringvarpið fyri lítlan og ongan kostnað. Uppgávan hjá Kringvarpinum er at skipa fyri at samskipa tíðina, sum send verður og at lurtarin kann fáa nyttu úr kringvarpinum.

Ein onnur sending er leygarkvøld, "hetta heilaga evangeliið skrivar". Hvør man lagnan fara at vera hjá hesi sendingini. Hóskar hon heldur ikki inn í heildarfatanina hjá Kringvarpinum. Og verður hon eisini varpað út?

Áheitan! Fjølmiðlaleiðari, leiðsla, stjóri og Kringvarpstýrið í Kringvarpi Føroya! Vit menna ikki Kringvarp Føroya við at skerja og skera tað burtur, sum gott er og sum enn hevur ein natúrligan leiklut í mongum heimum í Føroyum við lestri og bøn. Latum okkum halda fast við henda góða gamla siðin og styrkja hann. Tað gera vit eisini við morgunlestrinum bæði kl.07.15 og kl.09.50. Lat okkum varðveita endursenda morgunlesturin í tí blokkinum, sum er morgunútvarp frá kl.06.00-10.00.

# Tá onki ófført er!

KÁRI Á RÓGVI



**Nýtt ár. Bill Justinussen (sekur ið at sær tekur) ilskast um at moralur er aðrastaðni enn undir halanum. Og Sjúrður Skaale fegnast um "nøkur ting" afturfyri at Tjóðveldið tók undir við sparing innan mentan og skúla**

Hans Andreas skald yrkti Falkarímuna um, tá allir 'Føroya Harrar' hvukku, tí hin ungi lógkøni Edward Mitens stillaði upp fyri Sjálvstýrisflokkin til fólkatingsvalið í 1915. Tá varð tann rossahandil gjørdur at senda danska verjuskipið Islands Falk úr Íslandi eftir Andrassi Samuelsen (staddur í Bergen) at fáa hann til Føroya at føra valstríð móti tí unga og 'óinnspísta' valevninum. Ferðin kostaði risaupphædd eftir tátíðini – 6.000 krónur. Síðsta ørindi ljóðar (uttan formansloyvi):

- Seks túsund at spandera fyri embætismannamakt,
- tað líkist skili í Føroyum, sum fyrr er frá sagt.
- Teir spara til einkjuna, so neyðstødd hon er,
- Men sína makt at lívga, tá onki ófført er!

Løgið sum søgan gongur í ring. Júst nú hevur Føroya Løgting samtykt at lækka prísviðbótina á einkjupensjón, og góðtikið at fíggjarnevndin hevur kastað lut um fíggjarligu raðfestingarnar.

Heldur enn at taka undir við mær, at mistøk eru framd, tá ið hálvonnur millión ov nógv útgoldin í eyka landsstýrismannalønum, tá ið uttanlandsferðir ikki hava nakað endamál, at politiska skipanin er ótrúverdug, tá ið ongi veit hálvan desember, hvat ráð verða til fyrsta januar, og at landsins innbúgv ikki er finningarfiskur hjá fólksins tænarum – ja so velur Bill Justinussen at boða mær frá, at mistir verða "samstarvsmøguleikar við starvsfelagar."

Takk, men nei takk. Havi til fánýtis roynt samstarv. Fyrsta CHE var stovnað vildi Billurin ikki so frægt sum umrøða nevndarbýtið við okkum – fyrrenn seðlarni komu út, og hann sá at fleiri nevndarformenn (og teirra viðbøtur) høvdu flutt. So vórðu vit bidnir at fara frá avtalu okkara við A og B. Men Kári P. Højgaard, okkara botnheiðurligi formaður, vildi ikki hoyra talan um hetta. Sjálvstýrið ger sum Sjálvstýrið sigur!

Kortini fyrigav eg Billinum – vit plaffaðu Gerhard niður, bjargaðu Skúladeplinum og gjørdu breiða semju um hesa bygging. Men sami Bill ið atkvøddi fyri Skúladeplinum og sami Bill ið atkvøddi ímóti tunnli Norð um Fjall í vár – lækkaði játtanina til tann fyrra og hækkaði til tann seinna. Hetta er at bera rangan politiskan boðskap. Bill er sum sonurin ið segði ja men ikki gjørdi vilja faðirins.

Bill hevur við fíggjarnevndarsemjuni formøblað politiska trúvirði sítt. Hann og ávísur annar tingmaður vístu, at hóast teir er landspolitiskt valdir og báðir plaga at føra seg fram sum hugsjónarligar tingmenn, so girnaðust teir játtan skúla næsta síns og býttu peningin at tilbúgva tann breiða vegin har inni hjá sær sjálvum, har teir ætla at verða afturvaldir við tveimum nýggjum agnum. Teir sviku okkum fyri 30 prosent av Rituvíksvegnum.

Kraddarar eru menn sum Klávus í Feðgum á Ferð ið gramsa til dagligt breyð. Tí er 'kraddarar' eyðvitað ikki rætta orðið at brúka um menn, sum alment harmast kvinnur á tingi og siga at útreiðslur til hægru skúlanna eru "pengar niður í lummarnar hjá teimum ríku vælútbúnu í Havn." Her mugu heilt aðrar málsligar kenningar til sum "berserkajáttarar" ella "skúlasníkar."

Munurin okkara millum er, at var eg partur av semju um Rituvíksvegin, so helt eg lyftið, umenn Bill ikki sat í fíggjarnevndini. So billa tær ikki inn, at eg sakni samstarvið.

**Skeiv addressa, skeiv addressa**

Sjúrður Skaale roynir at eftirrationalisera álopið hjá fíggjarnevndini á útbúgving og gransking. Hann upplýsir, at "Tjóðveldi fór við í fíggjarlógarsemjuna til tess at fáa bøtt um nøkur ting. Tað eydnaðist."

Kann Sjúrður Skaale greiða okkum frá "nøkrum tingum" ið eru verd uppsagnir á hægru skúlum okkara og niðurlaging av mentunarøkinum?

Sambært Sjúrðir stýrir Kalsberg Føroyum. Men her má siga sum Janus skald sigsta hava sagt, tá ið hann varð biðin um at yrkja veitslusangir til okkurt ávíst høvi: "skeiv addressa, skeiv addressa; spyr bróðir, hann framleiðir í meturmál."

Hevði minnilutin í fíggjarnevndini ikki boðið seg til fals, so vóru tey fýra samgonguumboðini ikki samd um at játta ósamtyktum verkætlanum – og kanska heldur ikki at ójátta samtyktum verkætlanum. Kalsberg er ikki maður fyri breiðum semjum – men næstformaður Tjóðveldis orðaði grindabýtiseðlar í meturmál – og teir báðir Bill fingu upp í fleiri rossahandilsvognar! Og eins og góðir stemningsfullir veitslusangir, hevur Tobbin orðað fleiri kvøðuljóðamerdugar reglur í álitinum – alt Tjóðveldið sang av sama sangi og atkvøddi fýri íløguni "lokalt afturval av republiskum næstformanni."

Billurin ynskir mær gott nýggjár. Skal vera meiri ítøkiligur. Ynski at tey "sum sett eru at býta út geri tað í trúlyndi."

# Hvar gongur tú í skúla, lítli mín?

PETUR Í GONG



Í tíðindunum herfyri hoyrdu vit deildarstjórin fyri fólkaskúlan siga nakað soleiðis, at tað vóru ongar ábendingar um, at teir smærru bygdaskúlarnir kláraðu seg betur í Pisakanningunum enn teir stóru flokkarnir. Hetta tóktist sum grundgevingin fyri, at flokkarnir í t.d. Havn ikki verða verri fyri, um næmingar verða fluttir runt í býnum fyri at tryggja, at tað verða 26 næmingar í hvørjum flokki.

Men hetta hongur als ikki saman, tí hesi tingini hava einki við hvørt annað at gera. Á aðrari hondini ber ikki til at afturvísa, at færri næmingar til hvønn lærara er betur fyri læruna. Á hinari ber heldur ikki til at afturvísa, at umhvørvið hevur stóra ávirkan á næmingin.

At næmingar í t.d. Havn klára seg betur bókliga enn onnur, eiga vit ikki at takka flokksstøddini fyri. Tað snýr seg um umhvørvi. Tað snýr seg um væl útbúgvin foreldur, ið velja at seta búgv í størru plássunum. Umframt hópin av góðum íblásandi tilboðum, ið smærru plássini ikki megna at bjóða.

Hinvegin síggi eg fyri mær ein sjey ára gamlan smádrong í vesturbýnum, ið so nakkalangur og einsamallur ein myrkan morgun fer síni tungu fet oman í Kommunuskúlan, alt meðan vinmennirnir í gøtuni ganga í Venjingarskúlanum. Tó so. Kanska eigur hann at fegnast um, at hann ikki varð sendur niðan til Hoyvíkar.

Men vit ætla okkum jú so nógv á útbúgvingarleið. Serliga politiskt. Vit hava millum annað eitt fróðskaparsetur, ið ikki av egnum fríum vilja hevur hildið eina rúgvu av útlendskum serfrøðingum fyri rukku við at bjóða teimum til Føroya at oysa út av síni vitan. Onkur teirra var enntá komin so mikið langt, at tey hálvavegna stóðu mitt í húsakeypi.

Og so henda seinasta heilsanin frá Mentamálaráðnum, ið við sínum stórsinni vil betra um trivnaðin hjá børnunum við umlegging til rationella samlibandsstórdrift. Fullkomiliga uttan at hava varnast, at hetta eru ikki Ford T-bilar, tey hava við at gera.

# Stóra tøkk til Útvarp Føroya!

FRÍÐTÓR DEBES



Tað var við stórum áhuga, at undirritaði settist at lurta eftir eftirsendingini: Søgan um jødarnar 1 (10), ið fyrstuferð varð send í 1996. Stóra tøkk skal Kringvarpið hava fyri hetta so sera aktuella evni.

Í sendingini er tað Sonne Smith, ið tosar við Hans Holm, sum á ein sera meistarligan hátt greiðir okkum frá um jødiska fólkið og tess uppruna.

Eg rokni við, at tað eru fleiri við mær, ið longu gleða seg til næsta sunnudag millum kl. 15-16, tá næsta sending verður.